*Spennandi og týdningarmikil tingseta í heyst:*

# Skulu geva okkum góðar stundir at viðgera oljulóggávuna

*Tingformaðurin roknar við, at kolvetnislóggávan verður løgd fyri tingið síðst í september og at hon verður endaliga avgreidd fyri jól*



JAN MULLER

Tingið hevur havt úr at gera í longri tíð, men nú gongur móti endanum á hesi tingsetuni. Jógvan Ingvard Olsen, tingformaður sigur, at teir vónandi kunnu enda tingsetuna í komandi viku. Men hann torir einki at lova.

Tingið kemur so saman aftur á ólavsøku, sum vanligur siður er. Jógvan Ingvard Olsen sigur annars, at fleiri stór mál koma til viðgerðar á tingi í heyst.

Sum eitt tað mest umfatandi og eisini týdningarmikla málið nevnir hann alla kolvetnislóggávuna, sum nú hevur verið fyrireikað av Oljuráðleggingarnevndini í fleiri ár.

-Talan er um eitt stórt mál, sum helst kemur á tingborð tíðliga í heyst.

Tingformaðurin vónar, at tingið, tá tað kemur saman aftur seinast í september, kann fara undir viðgerðina av oljuloggávuni. Tað er um sama mundið sum fíggjarlógaruppskotið verður lagt fram.

Tá vildi eg gjarna havt lóggávuna á tingborð.

Hvussu nógv tíð fer so til at fáa hesa stóru og týðandi lóggávuna uppá pláss spurdu vit tingformannin?

-Sambært tingskipanini so skal hon koma aftur á tingborð, tá hon hevur ligið ein mánað í nevnd. Men formaðurin kann geva nevndini longri tíð, um nevndin heldur, at brúk er fyri tí.

Jógvan I. Olsen vísir á, at verður lóggávan løgd fyri tingið síðst í september og 1. viðgerð er liðug um hálvan oktober, so skuldi hon komið úr aftur nevnd í november ella desember og síðani endaliga samtykt fyri jól. Men hetta veldst stálvandi nógv um, hvussu forarbeiðið er gjørt.

*Oljulóggávan á tingborð seinast í september*

Jógvan I. Olsen vísir á, at tingið má brúka neyðugu tíðina til at viðgera hetta málið, tí tað er nakað spildurnýtt og kann sum so fáa stóran týdning fyri samfelagið langt inn í næstu øld. Tað ræður tí um at hava eina trygga og góða grund at standa á, tá farið verður til verka í hesi nýggju vinnu.

-Henda lóggávan hevur sera stóran týdning, og tí mugu vit ansa sera væl eftir, hvussu vit fara um, og so at vit ikki koma skeivt út.

Annars hevur løgmaður lovað tingmonnum at lata teir fáa so nógv tilfar sum gjørligt heim við sær í summarfrí at kunna seg við málið. Harafturat hevur hann nevnt møguleikan fyri at halda eitt seminar í heyst um spurningar, sum hava tilknýti til eina oljulóggávu og -vinnu.

Í hesum sambandi verður so eisini umhugsað at vitja politiskar stovnar og myndugleikar í øðrum londum.


JÁSPI KETLAR

Teir vælumtóktu ketlarnir eru á goymslu



Bæði dupultir og einkultir

Skulu tygum hava nýggjan ketil, so tosið við okkum og fáið eitt gott tilboð.
Vit hava serkønt fólk, ið geva eina skjóta og góða tænastu.

– Alt tilfar til hitaverk og sanitet fæst hjá okkum.

MARIA POULSEN & Co
Smyrilsvegur 8 – Tlf. 12000



Fyrsta floks

Føroyskt ungneytakjøt

| | | |
|---|---|---|
| Pakkar á 12 kg | 1 kg | Gullasch ella bankikjøt |
| Innihald: | 3 kg | malið kjøt |
| | 3 kg | kókikjøt |
| | 3 kg | steik v/ beini |
| Prísur kr. 450,- | 2 kg | steik u/ bein |

30 l. kaggar við lættsaltaðum neytakjøti
Prísur kr. 700,-

Kann keypast í avgreiðsluni hjá Mjólkarvirkinum í Hoyvík

MBM Kjøt

FR 420 Hósvík Tlf. 22482



Almenn skeið 1997-98

*Próvskeið í enskum*

a) **Skeið til Cambridge First Certificate in English**
byrjar *á Føroya Landsbókasavni* 3. september í einum flokki við undirvísing mikudag kl. 9.00–12.00.
– Fortreytir: 10. floks støði ella samsvarandi kunnleiki, ávísur førleiki í at nýta málið, talað og skrivað.

Lærari: Tórður Jóansson, MA, PhD.

b) **Skeið til Cambridge Certificate of Proficiency in English**
byrjar *á Føroyamálsdeildini* 3. september í einum flokki við undirvísing mikudag kl. 13.00–16.00.
– Fortreytir: Staðið »First Certificate«, students-, HF-, HH-prógv ella samsvarandi.

Lærari: Tórður Jóansson, MA, PhD.

Próvtøkurnar í enskum verða í mai/juni 1998.

Nágreiniligan upplýsingar og tilmeldingarbløð eru at fáa á setursskrivstovuni. **Tilmeldingarfreistin er sett til 8. august 1997.** Næmingatalið er avmarkað; næmingar verða upptiknir, sohvørt tilmeldingarnar koma inn, til talið er fult. – Tilmeldingargjaldið er 550 kr. Fyri próvtøku í First Certificate gjalda næmingar 600 kr. og fyri próvtøku í Proficiency 700 kr.

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum.

Fróðskaparsetur Føroya
Setursskrivstovan, tlf. 15302
handan Á 5
100 Tórshavn



Frá **Starvsmanna-felagnum**

Eykaðalfundurin, sum verða skuldi leygardagin 24. mai, er útsettur til í heyst. Seinni verður lýst nær og hvar fundurin verður.

**Nevndin**